# Óneyv donsk tíðindi

*TÍÐINDAFLUTNINGUR. Summir danskir fjølmiðlar eru ikki nóg hegnisligir, tá ið teir viðgera føroysk viðurskifti. Donsk blaðkona sigur, at illvilji ikki er orsøkin*

HØGNI MOHR

Gløgt er gestsins eyga, verður tikið til. Men hetta er ikki altíð galdandi fyri donsk tíðindafólk, sum vitja í Føroyum. Seinastu tíðina hava fleiri danskir fjølmiðlum verið í Føroyum í sambandi við kongligu vitjanina. Summi av skrivaðu brotunum, ið spurdust burtur úr, eru rættiliga villleiðandi og onnur púra skeiv.

Tíðindaflutningurin fór beinanvegin av sporinum, tá ið Drotningin steig fótin á eystaru bryggju. Føroyingar, ið lósu Jyllandspostin um vikuskiftið, mundu helst stúrsta við, tá ið blaðið greiddi frá móttøkuni á molanum. Sambært blaðið vóru fleiri túsund føroyingar og fagnaðu hennara hátigni. Men sambært keldum í løgregluni í Havn var talið 200 - 400; flestu teirra eldri konur og børn.

**B.T. 13. juni**

Hóast løgmaður nýtti minni enn tíggjundapart av røðu síni til drotningina í Fugloy at kunna um politisku støðuna millum Danmørk og Føroyar, staðfestir fyrrapartsblaðið, B.T., at: »Anfinn Kallsberg...nýtti stóran part av tíðini upp á ynski oyggjanna um sjálvbjargni«.

**Berlingske Tidende 13. juni**

Sigmundarkvæði, yngra, verður á donskum nevnt »Sigurdskvadet« í Berlingske Tidende. Tjóðsangur okkara, tú alfagra land mítt, eitur sambært sama blað, »Guð signi Føroyar, várt land«

Danska blaðið skrivar eisini, at elsti maður í Fugloynni, Mouritz Sørensen býr í gomlu húsum sínum í *Kirkjubø*. Og blaðkonan heldur í somu grein fram at tosa um *Kirkjubøar-búgvarnar* í Fugloynni.

**Politikken 13. juni**

Skerpikjøt luktar rotið, og tað *er* tað eisini, er ein av niðurstøðunum hjá blaðmanni á Politikken, sum hevur verið við hennara hátigni úti í Fugloy, har vertirnir borðreiddu við føroyskum krási.

**Fingið skeivar upplýsingar**

Hvør orsøkin til óneyva tíðindaflutningin er, ber ikki til at staðfesta. Men Sosialurin ringdi til tíðindakonuna á Berlingske Tidende, Britu Stenstrup, sum var við í fylginum í Fugloy. Vit kunnaðu hana um villurnar í blaðnum, m.a., at tjóðsangurin ikki eitur, »Guð signi várt land«. Danska blaðkonan var eitt sindur illa við:

- Hvat...hvat...hvat eitur hasin sangurin so..?

*Tú alfagra land mítt..!*

- ehh...ehh...júmenn...

*Hevur tú verið í Fugloynni sjálv?*

- Jú, eg var har úti. Eg stóð har undir liðini á teimum, ið sungu. Men...ehh... eg skilji jú ikki, hvat mann syngur...

*Hvaðani hevur tú so fingið heitið á tjóðsanginum?*

- Tað veit eg ikki. Einum av teimum lokalu...

**Ikki illvilji**

Í greinini hjá Britu Stenstrup er Kirkjubøur fluttur út í Fugloynna, men blaðkonan vil vera við, at hon ikki hevur skrivað tað. Villuna man onkur av redaktiónssekreterunum eiga, gitar Brita, sum fer at kanna, hvør hevur rættað tekstin hjá sær skeivan.

Brita Stenstrup hevur onga ítøkiliga viðmerking til, hví so nógvar villur eru í donskum bløðum, tá ið føroysk viðurskifti verða viðgjørd. Men hon leggur dent á, at tað ikki er illvilji, ið er orsøkin. Kortini væntar hon ikki, at mistøkini verða rættað í blaðnum




*Danskir skemtiteknarar duga væl at finna stuttlig og persónliga ólitað evni um Føroyar. Men eisini álvarsom donsk blaðfólk, sum skriva um okkum, fáa føroyingar at smírast. Orsøkin er, at tíðindaflutningur teirra í nógvum førum er óneyvur ella beinleiðis skeivur.*

*Tekning: Niels Bo Bojesen í Berlingsle Tidende 14.06.00*




# Bispafundur í Føroyum

*Nú donsku biskuparnir vóru samlaðir í samband við túsundárahaldið í Føroyum, nýttu teir høvi at halda ein sonevndan bispafund*

EDVARD JOENSEN

Fríggjadagin fyri hvítusunnu var bispafundur hildin í Føroyum, nú bisparnir vóru savnaðir kortini.

Hans Jacob Joensen, biskupur sigur, at tað vóru fyri tað mesta intern donsk mál, viðgjørd vórðu á fundinum. Tó var okkurt, sum viðkemur Føroyum.

Her nevnir hann, at tosað varð um at legja tær ymsu prestaligu eftirútbúgvingarnar saman, soleiðis at alt fæst á einum stað. Sum er, sigur biskupur, er neyðugt við ymsum støðum at fáa tær ymsu greinarnar upp á pláss.

Fólk halda helst, at alt gongur fyri seg á prestaseminarinum, men soleiðis er ikki. Í dag eru tað, sum sagt, fleiri støð, og tað ætla biskuparnir at broyta.

Eitt annað, tosað varð um á bispafundinum, var ein avtala millum týsku reformertu kirkjurnar og donsku fólkakirkjuna, sum føroyska kirkjan er partur av.

Talan er um eitt samstarv, sum í stuttum ger, at prestarnir í teimum ymsu kirkjunum uttan nakað kunnu gera fulla tænastu í kirkjum hjá øðrum kirkjusamfelag.

Hans Jacob Joensen, biskupur, sigur, at norska kirkjan longu hevur slíka avtalu.

Annars var fyri nøkrum árum síðan upp á tal at gera eitt líknandi samstarv, sum tó var nógv meira umfatandi. Tað var tað sonevnda Porvo samstarvið. Men føroyingar vildu ikki uppí, og tískil varð tað av ongum.



*Biskupar og prestar á veg úr Havnar Kirkju eftir hátíðarguðstænastuna hvítusunnudag*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

Hans Jacob Joensen, biskupur, sigur, at tað kortini ikki eru biskuparnir, sum avgera, um farast skal í slíkt samstarv. Tað ger tað Millumkirkjuliga Ráðið. Men biskuparnir hava viðmælt, at samstarvið verður tikið upp.

Millumkirkjuliga ráðið er ráð, sum valt er eftir fólkatingslóg. Ráðið er mannað við einum umboði fyri hvørt stift í Danmark, og tað skulu altíð vera tveir biskupar limir í ráðnum. Føroya hava eygleiðarastatus í ráðnum, og føroyski eygleiðarin er Uni Næs, sóknarprestur í Fuglafirði.

Millumkirkjuliga Ráðið hevur skrivstovu í Danmark, sum virkar alla tíðina, hóast sjálvt ráðið verður valt av nýggjum. Skrivstovan verður rikin við kirkjuligum peningi. Tað vil siga av tí kirkjuskatti, sum danir gjalda.



# Drotning Ingridarbarnagarður 50 ár

*Drotning Ingridar Meinigheitsbarnagarður heldur 50 ára stovningardag leygardagin tann 17. juni*

Hósdagin 15. juni 2000 fyllir barnagarðurin 50 ár, og í tí sambandi verður opið hús í barnagarðinum **leygardagin tann 17. juni frá kl. 12 til 16.**

Skráin fyri dagin verður henda:

kl. 11:
Familjugudstænasta í Vesturkirkjuni, har m.a. øll børnini í barnagarðinum fara at syngja, kórið Aurora Borealis fer at syngja og bíbliusøga verður lisin

kl. 12–16:
Opið hús í barnagarðinum, har øll eru vælkomin

kl. 12–16:
Framsýning av myndum v.m. og ljósbíløt

kl. 12.30:
Børnini í barnagarðinum syngja í kór

kl. 13.00:
Hornorkestrið hjá Frelsunarherinum spælir

kl. 13.30:
Sjónleikur, sum børn í barnagarðinum spæla

kl. 14.00:
Kórið Ten-sing syngur gospelsangir

kl. 14.30
Sjónleikur, sum børn í barnagarðinum spæla (sami leikur)

kl. 16.00
Tiltakið endar

Øll tiltøkini eru almenn.

# Hátíðarløta í Leirvík

Leygardagin 3. juni hevði ein stórur partur av bygdarfólkinum í Leirvík leitað sær niðan í viðarlundina, tað sokallaðu Limmilundina, til hátíðar- og hugnaløtu. Sólin skein bæði oman og niðan hesa fagnaðarstund, og løtan gjørdist ógloymandi fyri bygdarfólkið.

Umhvørvisbólkurin í Leirvíkar kommunu hevði lagt dagin til rættis. Á skránni var nógvur sangur og tónleikur m.a. sang frálíka genturkórið í Leirvík nakrar sangir. Sum eitt serligt tiltak varð skipað fyri, at allir næmingarnir í komandi 1. flokki í Leirvíkar skúla sluppu at gróðurseta hvør sítt træ saman við foreldrum sínum. Tað tað var liðugt, hevði bygdarfólkið høvi til at fáa ein plantupakka við ymskum trøum í.

Bygdarráðsformaðurin Sjúrður Eliasen segði eisini nøkur orð. Hann nevndi m. a. at tiltakið í viðarlundini var serliga ætlað at gera fólk varug við henda blettin í náttúru okkara.

- Eg minnist henda blettin, sum nú er okkara viðarlund, sum eitt vanligt gerði, eins og øll onnur gerðir, her í bygdini.Hetta var í mínum uppvøkstri gerðið hjá teimum úti á Bø, Oliviu og John. Kúgvin var týdningarmikil í mínum uppvøkstri, og her kundi tú um summrarnar síggja tey úti á Bø knossast við hoyggið. Tíðir broytast. Kúgvin er ikki longur í hvørjum kjallara í bygdini. Traðirnar fóru smátt um smátt at verða brúktar til annað enn tað at fáa kúnna undan við. Olivia og John valdu hetta, og nú er viðarlundin her. Øll vita vit, at tað er eitt megnar arbeiði tey bæði við sínum hava lagt í viðarlundina, sum vit øll nú kunnu frøast um. Tey hava gjørt eitt megnar slóðbrótandi arbeiði, og tøkk fái tit fyri tað.



*Tórhild Bjarkhamar, bygdarráðslimur, handar Oliviu Joensen heiðursgávu.*

Serligur gestarøðari henda dagin var Tróndur Leivsson, skógfúti. Hann greiddi frá, at tað at planta trø í Føroyum er fyrndargamalt. Í fleiri útgrevstrum eru funnin dømi um, at trø hava verið plantað í Føroyum í gamlari tíð, so at siga, at træplanting ikki ber til her á landi er ikki rætt. Tróndur nevndi eisini, at tað, at bygdir eru vorðnar vetrarfriðaðar fyri seyð, hevur gjørt træplanting hópin lættari.

Ein serlig heiðursgáva frá Leirvíkar kommunu varð handað Oliviu Joensen. Tað var Tórhild Bjarkhamar, bygdarráðslimur og formaður í umhvørvisbólkinum hjá Leirvíkar kommunu, sum handaði gávuna. Gávan er ein skál úr ahornviði, sum Ole Jacob Nielsen, listamaður, hevur dreygað. Tórhild segði m.a.:

- Tolin trívst og treiskur vinnur, sigur eitt gamalt orð. Hetta mugu vit øll sanna, nú vit í dag eru savnað her í Limmilundini til hátíðarhalds. Høvdu tygum, saman við manni tygara, ikki verið so íðin og trúføst í tygara arbeiði at gróðurseta hesa viðarlund, so høvdu vit, sum í hesi bygd búgva, ikki kunna latið eygað skoðað og sinnið glettst um ta sjón, ið møtir okkumm, tá vit leita okkum niðan á Brekkur. Tað, sum tygum her hava framt, fer at standa sum eitt prýðiligt stórverk. Henda viðarlund fer at verða uppvaksandi ættarliðnum eitt fyridømi um, at við kærleika og nærlagni til náttúruna kunnu tey útinna nógv, sum er til gleðis og gagns fyri mong menniskju.. Hjartans tøkk, Olivia.

Væleydnaða løtan í Limmilundini endaði við, at tað nógva fólkið, sum var komið saman, setti seg at eta matpakka, meðan tey nutu tað vælsignaða góðveðrið.

**rb**

# Alnót 10 mió kr í nýggjum kapitali

Telefelagið Alnót fekk mikudagin 10 mió kr í nýggjum partapeningi.

Høvuðsíleggjararnir eru Framtaksgrunnur Føroya, Kaupthing og ein svenskur íleggjari. Harafturat eru smærri føroyskir íleggjarar, m. a. KT-fyritøkan VIT, sum setti felagið á stovn fyri einum ári síðani. Felagið hevur føroyskan meiriluta.

Nevndarlimir í felagnum eru Jóannes Kjølbro, Jens Kári Vilhelm, Jan Otto S. Holm, Halvor Snarvold og Meinhard Jacobsen. Nevndin skipar seg ein av komandi døgunum.

Alnót fer at veita fjarskiftistænastur til heystar.

# Føroyar ongan týdning fyri NATO

*Danskur hernaðarserfrøðingur heldur, at fíggjarligi fyrimunurin, sum Danmark hevur fingið í NATO-samstarvinum, er orsakað av Grønlandi og ikki Føroyum*

EYÐUN KLAKSTEIN

Professari í altjóða politikki á universitetinum í Keypmannahavn heldur, at tað fer ikki at eydnast føroyingum at fáa nakað burtur úr at brúka hernaðarmál í samráðingunum við stjórnina.

- Hetta fer at miseydnast. Eftir Kalda Kríggið hava Føroyar ongan serligan leiklut havt í hernaðarligum samanhangi, sigur Ole Wæver, sum hevur verið limur í donsku Forsvarskommissionen, við danska blaðið Berlingske Tidende í gjár.

Landsstýrið sigur seg hava funnið fram til, at Danmark hevur spart einar 30 milliardir í verjuútreiðslum, tí teir hava brúkt Føroyar í NATO-høpi.

- Hetta passar ikki. Danmark hevur fingið ein ávísan fíggjarligan fyrimun í NATO-samstarvinum, men hetta er við vissu orsakað av Grønland, sum hevur havt nógv størri týdning enn Føroyar fyri USA, sigur Ole Wæver við danska blaðið.

- Um Føroyar ikki høvdu samstarvað við NATO undur Kalda Krígnum, so hevði NATO funnið eitt annað stað til radarstøðina.

**Slapp ikki á dagskránna**

Undan samráðingunum, sum vóru í gjár, hevur drúgt brævaskifti verið millum løgmann og forsætisráðharran um júst hernaðarmál.

Landsstýrið krevur eina kunning frá donsku stjórnini um leiklutin, sum Føroyar hava havt og hava í verjupolitiskum viðurskiftum. Hetta vil landsstýrið hava at vita, tí tað skal brúkast sum grundarlag fyri at leggja framtíðar politikkin til rættis á verjuøkinum.

Forsætisráðharrin vil ikki geva landsstýrinum nakra kunning uttan hana, sum Verjumálaráðið hevur gjørt. Í notatinum frá Verjumálaráðnum eru bara faktuellar upplýsingar um virksemi hjá donsku verjuni í Føroyum, og einki nýtt er í hesum notati.

Hóast landsstýrið kravdi at fáa hernaðarmál við í dagskránna fyri fundin í gjár, so kom tað ikki við. Danski forsætisráðharrin vildi ikki hava hetta mál við í dagskránna, og tí bakkaði landsstýrið. Um partarnir ikki høvdu verið samdir um dagsrkánna, hevði tað ikki latið seg gjørt at havt nakran fund.

